LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Runavíkar kommuna
Heiðavegur 26
600 Saltangará

Tórshavn, tann 28. august 2023
J.Nr.: LUM 23/14461-13
Tykkara J.nr.

**Viðvíkjandi viðgerð hjá Runavíkar kommunu av einari umbøn um alment innlit**

Tann 4. juli 2023 fekk eg eina klagu frá einum fjølmiðli um, at Runavíkar kommuna ikki hevði avgreitt eina umbøn um innlit til tíðina.

Tann 20. juni 2023 sendi klagarin Runavíkar kommunu umbøn um innlit í ávíst mál um byggiloyvi. Sama dag fekk klagarin móttøkuváttan.

Sambært klagaranum vendi hann sær tann 4. juli 2023 til skrivstovuna hjá kommununi um innlitsmálið, men har var eingin á skrivstovuni, sum kundi hjálpa við innlitsmálinum. Sama dag varð klaga send til mín, og eg sendi klaguna til Runavíkar kommunu við áheitan um at lata mær frágreiðing um málið og skjølini í málinum. Freistin varð sett til 1 viku.

Tá freistin var farin og ikki var frætt frá Runavíkar kommunu, sendi eg tann 12. juli 2023 áminning til Runavíkar kommunu um málið og minti samstundis kommununa á týdningin av, at mál um alment innlit mugu avgreiðast sum skjótast.

Tann 27. juli 2023 fekk eg kunning frá Runavíkar kommunu um, at innlitsumbønin varð svarað 20. juli 2023. Eisini fekk eg skjølini í málinum, men onga frágreiðing um viðgerðina av málinum.

Tann 9. august 2023 sendi eg kommununi áminning um at lata mær umbidnu frágreiðing, og bað eg kommununa í hesum sambandi at greiða frá, hví tað tók kommununi 1 mánað at svara innlitsumbønini.

Tann 17. august 2023 svaraði Runavíkar kommuna:" Vísandi til skriv tykkara, so er einasta orsøk til at málið ikki er svarað, at umsitingin ikki hevur havt stundir til at avgreiða hetta áðrenn summarferiuna – hetta áttu vit sjálvandi at havt fráboðað, men tað er tíverri ikki gjørt."

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

Í § 16, stk. 2 í innlitslógini er ásett, at er ein áheitan um skjalainnlit ikki gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur móttikið hana, skal myndugleikin boða viðkomandi frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals.

Sambært § 16, stk. 2, hevur myndugleikin sostatt eina fráboðanarskyldu. Ásetingin hevur eisini sum fyritreyt, at myndugleikin beinanvegin snarkannar eina umbøn um innlit, soleiðis at myndugleikin skjótast gjørligt er førur fyri at gera sær eina meting av, hvussu málsviðgerðin skal handfarast, og hvussu drúgv málsviðgerartíðin kann væntast at verða.

§ 16, stk. 2 í innlitslógini hevur serligan týdning fyri fjølmiðlar, har alment innlit ofta er knýtt at einum ávísum tíðarbæri í sambandi við ítøkiligan tíðindaflutning.

Fráboðanarskyldan sambært § 16, stk. 2 í innlitslógini er treytaleys. Tískil skal ein myndugleiki leggja síni viðurskifti soleiðis til rættis, at hann er førur fyri at geva eina rættstundis fráboðan um tey viðurskifti, ið gera at málsviðgerðin av einari innlitsumbøn verður seinkað.

Soleiðis sum málið er lýst, kann eg staðfesta, at tað gekk ein 1 mánaður frá tí, at klagarin tann 20. juni søkti um alment innlit, og til Runavíkar kommuna tann 20. juli svaraði innlitsumbønini, og at klagarin ikki fekk nakra fráboðan samsvarandi reglunum í § 16, stk. 2 í innlitslógini. Harafturat svaraði kommunu heldur ikki mínari umbøn um frágreiðing og skjøl rættstundis, men mátti eg senda tvær áminningar, áðrenn eg fekk svar sum umbiðið. Hetta er ikki nøktandi.

Eg haldi eisini, at frágreiðingin hjá Runavíkar kommunu um, at umsitingin ikki hevði stundir til at avgreiða málið áðrenn summarferiuna, og at tey tíverri ikki høvdu sent klagaranum fráboðan um hetta, ber brá av, at viðgerðin av innlitsmálum ikki er nógv væl skipað.

Samanumtikið fari eg tí at geva Runavíkar kommunu eina átalu fyri handfaringina av hesum máli.

Avrit av hesum skrivi er sent klagaranum til kunningar og verður í næstum almannakunngjørt á heimasíðu okkara www.lum.fo í navnleysum líki.

Vinarliga

Hanna Vang

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður